MENTAMÁLARÁÐIÐ

FÓLKASKÚLIN

FØROYSKT
10. FLOKKUR

Týsdagin 15. mai 2012
kl. 13.30 - 17.30

Loyvdir hjálparmiðlar: Orðabøkur

Vel eitt av hesum evnunum og skriva um tað:

1. Krimi .....s. 3

- Skriva eina spennandi krimisøgu!
- Her eru 21 orð og setningar, í tíni søgu skalt tú nýta í minsta lagi 10 teirra
- Myndirnar kunnu nýtast til íblásturs

Yvirskrift: **Krimi**

2. Peabody og súreplini .....s. 4-5

- Greina og tulka søgubrotið.
- Set myndirnar í samband við søguna.

Tekstur: Madonna úr ”Mr. Peabody’s Apples”, 2003. Týtt hevur Anna Maria R. Jensen.

Yvirskrift: **Peabody og súreplini**

3. Flóvin Bænadiktsson .....s. 6-7

- Hevði kvæðið verið skrivað sum ein stuttsøga í okkara tíð, hvussu hevði hon so verið? Skriva kvæðið um til eina nýmótans stuttsøgu.

Yvirskrift: **Flóvin Bænadiktsson**

4. Reality sending í Føroyum .....s. 8

- Gerið eitt uppskot til, hvussu ein føroysk realitysending kundi verið?

Yvirskrift: **Realitysending í Føroyum**

5. Samskifti .....s. 9

- Skriva ein blogg um tøkniligt samskifti.
- Hvussu er samskifti í dag?
- Hvussu samskiftir tú við onnur, er munur á alt eftir, hvønn tú samskiftir við?
- Hvussu væntar tú, at tað fer at verða í framtíðini?
- Myndirnar kunnu nýtast til íblásturs

Yvirskrift: **Samskifti**

1 Krimi

- Skriva eina spennandi krimisøgu!
- Her eru 21 orð og setningar. Í tíni søgu skalt tú nýta í minsta lagi 10 teirra
- Myndirnar kunnu nýtast til íblásturs

Orð:

gásarhold
nakkahárini reisa seg
ræðslusligin
morð
myrkur
óhugnaligt
pína
slag
onki samband
lík
ein smellur
kriminaldeildin
112
høglbyrsa
fíggindi
skaðastova
blóð
lummalykt
tað rann honum kalt niður eftir rygginum
tað lætnaði fyri hjartanum
hvussu kundi hetta lata seg gera

Krimi:
Krimi er eitt tekstslag, ið er nógv lisið kring heimin. Vit kenna øll detektivarnar Sherlock Holmes og Tintin og føroysku Hannis Martinsson og Krimi Nellu. Teir kendastu krimi rithøvundarnir eru útlendingar, men føroyingar hava eisini roynt seg, og nú hevur tú møguleikan!

http://blog.couponsherpa.com/10-unique-last-minute-decorating-ideas/

http://bluebits.dk/webudvikling/er-du-onlineklar-til-2011/

http://www.theresebauer.com/html/krimi.htm

2 Peabody & súreplini

- Greina og tulka søgubrotið.
- Set myndirnar í samband við søguna.

Í Happville (sum var ein lítil býur) hevði Little League spælt dyst; Peabody og leikararnir vóru væl nøgdir við dystin. Teir høvdu ikki vunnið, men tað løgdu teir einki í, tí teir høvdu havt tað so stuttligt. Peabody var søgulærari í barnaskúlanum, og um summarið plagdi hann hvønn leygardag at venja baseball við næmingunum og at skipa fyri baseballkappingum.

Billy Little (sum var ein lítil drongur) var ein av næmingunum. Hann elskaði baseball, og honum dámdi sera væl Peabody. Billy kendi seg væl og slapp altíð at hjálpa Peabody at savna saman batt og bóltar eftir dystirnar. Tá ið hann var liðugur, plagdi Peabody at smílast og siga: „Takk fyri, Billy, hatta var frálíkt. Vit síggjast næsta leygardag."

So plagdi Peabody at fara til gongu til hús eftir høvuðsgøtuni í Happville (sum var ein lítil gøta). Hann heilsaði uppá øll, sum hann kendi, og tey heilsaðu øll aftur. Hann gekk altíð framvið fruktsøluni hjá Funkadeli. Hann steðgaði á og hugdi at leskiligu súreplunum; fekk sær tað leskiligasta, smoygdi tað niður í taskuna og helt leiðina fram.

Hinumegin vegin stóð Tommy Tittlebottom forvitin og eygleiddi Peabody, tá ið hann fór avstað við súreplinum.

„Løgið," segði Tommy fyri seg sjálvan. "Peabody rindaði ikki fyri súreplið, hann tók tað bara." Tommy leyp upp á rennifjølina og skundaði sær yvir til vinfólkini at siga teimum frá tí, sum hann hevði sæð.

Næsta leygardag spældu dreingirnir aftur dyst. Teir taptu (sum vant), men eingin legði nakað í tað, tí teir høvdu havt tað so stuttligt. Billy savnaði bóltar og batt saman, og Peabody fór til gongu til hús. Hann heilsaði uppá tey, sum hann kendi, og tey heilsaðu aftur. Enn eina ferð steðgaði hann uttanfyri hjá Funkadeli, tók tað leskiligasta súreplið, smoygdi tað niður í taskuna og helt leiðina fram.

Hinumegin vegin stóðu Tommy Tittlebottom og vinfólk hansara og eygleiddu hann. Tey undraðust á tað, sum tey sóu. Peabody hevði ikki goldið fyri súreplið.

Tey fingu ikki hildið sær, men skundaðu sær at siga øðrum vinum frá. Vinum, sum søgdu foreldrunum frá. Foreldrum, sum søgdu sínum vinum í Happville (sum var ein lítil býur) frá.

Næsta leygardag stóð Peabody einsamallur á vøllinum og undraðist á, hvar øll hini vóru. Tá sá hann Billy koma gangandi móti sær. Hann sá keddur út.

„Hey Billy. Gott at tú komst, men hvar eru allir hinir á liðnum?" spurdi Peabody

Billy svaraði ikki.

„Hvat feilar?" spurdi hann uppaftur. Billy hugdi ikki upp.

„Teir halda allir, at tú stjelur," segði hann og hugdi niður í vøllin.

Peabody sá ørkymlaður út. Hann lyfti hattin av høvdinum og kláaði sær um nakkan. „Hvør sigur, at eg stjali? Og hvat siga tey, at eg stjali?" spurdi hann.

„Tommy Tittlebottom og vinfólk hansara siga, at tey tvær ferðir hava sæð teg tikið súrepli í fruktbúðini uttan at gjalda fyri tey," svaraði Billy.

„Nú, soleiðis," segði Peabody og læt seg í hattin aftur. „Kom, skulu vit ikki fara at fáa okkum eitt prát við Funkadeli?"

Teir gingu gjøgnum høvuðsgøtuna (sum var ein lítil gøta), og Peabody heilsaði upp á øll, sum hann kendi, men nú vóru nøkur, sum ikki heilsaðu aftur, og onnur lótust als ikki at síggja hann. At enda komu teir til fruktbúðina hjá Funkadeli.

Funkadeli kom út og segði: "Ádú, hvat gert tú her longu, Peabody, spæla tit ikki dyst í dag?"

"Nei, dysturin verður av ongum í dag," segði Peabody. „Og so var tað, at eg hugsaði, um eg kundi fingið mær súreplið eitt sindur fyrr enn vant?"

„Sjálvandi, hví ikki?" svaraði Funkadeli. „Tú rindar fyri súreplini hvønn leygarmorgun, tá ið tú keypir mjólk. Tú kanst taka tey, tá ið tú vilt. Fá tær hatta stóra leskiliga Peabody!" Peabody tók súreplið,

smíltist og rætti Billy tað. ”Takk, eg kundi hugsað mær tað, men eg má fara at leita eftir Tommy alt fyri eitt og siga honum, hvussu alt hongur saman. ”Ja, og bið hann koma heim til mín. Eg kundi eisini hugsað mær at fingið eitt orð á hann,” svaraði Peabody.

Lítla løtu seinni fann Billy Tommy og greiddi honum fra avtaluni um súreplini. Hann segði Tommy, at Peabody fegin vildi tosa við hann alt fyri eitt. Tommy rann yvir til Peabody, ringdi við duraklokkuni, og Peabody kom út at lata upp. Eina løtu hugdu teir bara, hvør uppá annan. ”Jamen...emm...Peabody,” segði Tommy, har hann stóð á trappusteininum. „Eg skilti jú púrasta einki; eg veit, at eg átti ikki at sagt tað, sum eg segði, men tað sá veruliga út, sum at tú ikki rindaði fyri súreplini.” Eygnabrýrnar á Peabody kvinkaðu eitt vet uppeftir, og hann kendi eitt flótt lot fara um andlitið. ”Hvussu tað sær út, hevur ongan týdning. Einans sannleikin hevur týdning.” Tommy hugdi niður og segði: ”Eg eri so keddur av hesum, hvussu kann eg gera tað gott aftur?”

Peabody suffaði við, hugdi upp á himmalin at einum lítlum skýggi, og segði: „Veitst tú hvat, Tommy? Kom oman á baseballvøllin um ein tíma, og tak ein kodda við tær, ein kodda, sum er fyltur við fjaðrum.

„ Í lagi,” segði Tommy og rann til hús eftir einum kodda.

Ein tíma seinni hittust Peabody og Tommy einsamallir á vøllinum. „Hey Tommy,” segði Peabody. „Kom nú bara við mær og tak koddan við.”

Tommy fór aftaná Peabody heilt niðan til tey ovastu áskoðaraplássini, men hann visti hvørki út ella inn. „Tað er eitt lot í dag, ha?” spurdi Peabody, tá ið teir vóru komnir niðaná. Tommy nikkaði.

„Tak nú hendan saksin, sker hol á koddan og rist fjaðrarnar úr honum.”

Tommy var ørkymlaður, men hann gjørdi, sum Peabody bað hann. Hann helt, at hetta var ein léttur máti at gera tað gott aftur. Fjaðrar í túsundatali fóru við lotinum.

Tað lætnaði fyri Tommy, og hann segði: „Var hetta alt? Er tað so í lagi nú?” „Nei, eitt er eftir,” segði Peabody. ”Nú mást tú henta allar fjaðrarnar uppaftur.” Tommy setti knyklar í brýr. „Eg haldi ikki, at tað ber til,” svaraði Tommy. „Tað er líka ógjørligt at bøta skaðan, sum tú hevur gjørt við at spjaða slatur um, at eg stjali,” segði Peabody. ”Hvør fjøður umboðar eitt fólk í Happville.”

Nú var long tøgn, og Tommy skilti tað, sum Peabody hevði sagt. At enda segði hann: „Eg fái úr at gera.” Peabody smíltist og segði: ”Ja, tað er vist. Minst til næstu ferð, ikki at vera so skjótur at døma fólk. Og hav eisini í huga, hvussu stórt vald orð hava.” Síðani gav hann Tommy hitt leskiliga súreplið og fór til gongu heimaftur.



Tekstur og myndir úr ”Peabody og súreplini” eftir Madonnu, 2003
Anna Maria R. Jensen týddi úr enskum í 2003

3 Flóvin Bænadiktsson

- Hevði kvæðið verið skrivað sum ein stuttsøga í okkara tíð, hvussu hevði hon so verið? Skriva kvæðið um til eina nýmótans stuttsøgu.

Flóvin Bænadiktsson

1. Árla var um morgunin,
sól tók fagurt at skína:
Marita snúðist av hallini út
við [1]fylgismoyggjar sínar.

Niðurlag:
Lat meg sova á tínum armi,
ríka jomfrúa.

2. Árla var um morgunin,
roðar fyri sól:
Marita snúðist av hallini út
við fylgismoyggjar tólv.

3. Marita snúðist av hallini út
við fylgismoyggjar sínar,
møtti henni Flóvin Bænadiktsson
undir so grønar líðar.

4. Tað var Flóvin Bænadiktsson
hann tók hana í sín favn:
"Guð fyriláti tær, søtan mín,
tú lovaðist øðrum manni!"

5. "Faðir og móðir meg burt góvu,
so mínir [2]frændur fleiri,
tá kom sorgin í mítt bróst
og ikki gleðin meiri.

6. Faðir og móðir meg burt góvu,
so mínir frændur flestu,
tá kom sorgin í mítt bróst
og ikki gleðin besta."

7. "Hoyr tú, frúgvin Marita,
[3]lætta av angist og trega!
eg skal sláa Hermann í hel
og med teg av landi draga!

8. Hoyr tú, frúgvin Marita,
er tað við tín vilja?
eg skal sláa Hermann í hel
og teg frá honum skilja."

9. "Hoyr tað, Flóvin Bænadiktsson,
tað er ikki við mín vilja!
tann sami Guð, os saman kom,
hann kann os best at skilja."

10. Marita snúðist haðan burt
í tí sama orði,
hon kom ikki fyrr til hallar heim,
enn Hermann sat yvir borði.

11. "Hoyr tú, frúgvin Marita,
[4]hví hava tíni eygu so runnið?
tú hevur verið í kirkju í dag,
og Flóvan hevur tú funnið."

12. "Eg var meg við kirkju ídag,
men Flóvan ikki fann,
har misti eg mínar gullringar burt
og so mítt reyðargullband.

13. Hoyr tað, harra Hermann,
hvat eg beri fyri brósti:
[5]vegin er mín sæli faðir,
forðum drongur treystur!"

14. "Hoyr tú, frúgvin Marita,
lætta av angist og trega!
eg skal ríða á markir út
hans banamann at vega."

15. Tann fyrsta píl, í skóginum
var skotin,
hon var gjørd av stáli,
hon fleyg fyri harra Hermanns
bróst,
hon stansaði hans máli.

16. Tann onnur píl, í skóginum
var skotin,
hon var skotin av treysti,
hon fleyg fyri harra Hermanns
bróst,
hann fell av sínum hesti.

17. Svaraði harra Hermann,
hann fell av hesti sínum:
"Harra Guð faðir av himmiríki
heilsi mær Maritu míni!

18. Harra Guð faðir av himmiríki
heilsi mær Maritu míni!
bæði væl og høviskliga
[6]behaldi hon ævi sína!"

19. Gevið ljóð og lýðið á!
eg kvøði, sum eg kann:
syrgilig bóru tey boðini
fyri Maritu fram.

20. Frætti tað Flóvin Bænadiktsson,
hann sat í búnum tavli:
deyður er harra Hermann,
so reystur drongur av alvi.

21. Tað var Flóvin Bænadiktsson,
hann sópaði talvið saman,
biður gott fyri riddarans sál,
[7]helsti var hann gamal.

22. "Saðlum várar hestarnar,
og ríðið undir oy!
nú skal eg festa einkjuna,
eg fekk hana ikki moy!

23. Saðlum várar hestarnar,
ríðið gjøgnum lund,
nú skal eg festa einkjuna
tað hitt væna sprund."

24. Flóvin býður Maritu
í song við sær at liggja;
takk havi frúgvin Marita,
hon vildi ei tað boð [8]tiggja!

25. Hon gav seg í nunnuklostur
við so góða [9]trú,
onga tíð á ævini
ivir hon sum nú.

http://theteenagebride.blogspot.com/2010/06/what-inspiration.html

[1] *tænastukvinnur*
[2] *skyldfólk*
[3]*ver ikki so bangin, stúrin*
[4]*hví hevur tú grátið*
[5]*dripin*
[6]*ynskir at liva leingi*
[7]*helst*
[8]*hon segði nei takk*
[9]*trúgv*

4 Realitysending í Føroyum

- Gerið eitt uppskot til, hvussu ein føroysk realitysending kundi verið?

Árið er 2030, Føroyar eru broyttar, Suðuroy, Sandoy og Nólsoy hava fingið undirsjóvartunlar, og ongin býr longur á smáu útoyggjunum. Landsstýrið er samt um, at landið kann vinna pening við at nýta smáu oyggjarnar til annað enn bústaðir, eitt nú til realitysendingar, tí stendur henda lýsingin í bløðunum:

Hestur, Fugloy og Koltur
næsta stað fyri kendar
stjørnur ella komandi
stjørnur

Hevur TÚ hugskot til, hvat oyggjarnar kunnu nýtast til, og hugskotið er gott, verður tað títt hugskot, sum verður at síggja á sjónvarpsrásum víða um.

http://www.panoramio.com/photo/17500086

http://my.opera.com/Mathilda/albums/showpic.dml?album=317033&picture=4659693

http://da.wikipedia.org/wiki/Fil:Hestur,_Faroe_Islands.JPG

5 Samskifti

- Skriva ein *blogg um tøkniligt samskifti.
- Hvussu er samskifti í dag?
- Hvussu samskiftir tú við onnur, er munur á alt eftir, hvønn tú samskiftir við?
- Hvussu væntar tú, at tað fer at verða í framtíðini?
- Myndirnar kunnu nýtast til íblásturs

http://gadgetmix.com/apple/review-imac-2011/

http://www.engadget.com/2010/06/07/iphone-4-announced/

http://msn-messenger.telecharger360.com/captures/logo-msn-messenger-en-telecharge-ment-windows

http://nokia-news.com/

http://cheesycrazy.deviantart.com/art/Skype-Logo-116114358

***at blogga:**
orðið blog kemur av web log. At blogga er at hugleiða um eitt hvørt evni og leggja tað út á netið. Ein bloggur er persónligur, har sagt verður frá egnari hugsan um eitt evni. Tað eru sum oftast einstaklingar, sum blogga, men tað kann eisini gerast í bólki.